# Bilar til sýn í Svínoy





*Tveir menn frá Bileftirlitinum vóru og sýnaðu bilarnar í Svínoy. Sýningin gekk fyri seg bæði inni og úti*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Bileftirlit Føroya var á Svínoynni og sýnaði bilarnar herfyri. Svínoyingar vita ikki at siga, um tað er hent áður**

BILEFTIRLIT
*Solby A. Eliasen*

**Svínoy:** Lagt varð upp til rættiligt bilprát í garasjuni, har sýningin fór fram, tí tað var sera ójavnt, hvørjum standi teir seks bilarnir, sum skuldi sýnast, vóru í. Tveir mans frá Bileftirlitinum vóru komnir til oynna at sýna bilarnar. Og tað gekk bæði skjótt og væl at fáa arbeiðið frá hondini.

Svínoyingarnir vóru bæði blíðir og týðir. Lagið var avbera gott á øllum, hóast onkur bilur fekk nógvar krossar. Og ein bilur var í so vánaligum standi, at hann fekk koyriforboð. Men um nakar hevði sett hagtøl yvir bilarnar í Svínoy upp, so høvdu hesi helst víst, at tað er svart ella hvítt í Svínoy, tá tað kemur til bilar. Onkrir vóru í sera góðum standi, meðan restin so avgjørt hevði sæð betri dagar.

Prátið gongur altíð lívliga fyri seg, tá menn savnast um bilar. Og hesin dagurin í Svínoy var onki undantak. Menn prátaðu um slitnar bremsur, motorar, rust og mangt, mangt annað. Eisini fall prátið inn á hetta, at Bileftirlitið nú var komið til oynna at sýna bilarnar.

- Tað er avbera gott, at teir eru komnir her nú, tí so kunna vit fáa staðfest, um bilarnir eru í nóg góðum standi, helt ein maður fyri.

So hvørt sum bilarnir vórðu koyrdir inn, høvdu menn allatíðina onkra viðmerking og nógv bleiv argað og flent.

- Tað er bara at skriva krossar allastaðni, segði ein, meðan hinir stóðu og smáflentu. Tað bleiv sum sagt nógv prátað henda dagin, og summir vistu eisini onkrar skemtisøgur.

- Eg havi einaferð fingið fráboðan til sýn, sigur ein maður.

- Á Kalsoynni, leggur hann afturat. Og so flennir hann í kíki og heldur fram, at hann nakrar dagar aftan á varð uppringdur av Bileftirlitinum, har tey gjørdu vart við, at hann ikki var møttur til sýn við bilinum tann og tann dagin á Kalsoynni.

- Eg segði við viðkomandi, at eg var staddur í Svínoy, og at tað stutt sagt ikki kundi lata seggera, men spurningurin eg fekk aftur, var um tað ikki var á somu oyggj, sigur hesin svínoyingurin og stórflennir.

Hendan misskiljingin varð so rættað tá, og síðani hevur hann ikki fingið boð um at koma til sýn við bilinum. Hann segði, at hetta var tann triði bilurin,sum hann átti, og hetta var fyrstu ferð, at Bileftirlitið var komið til oynna at sýna bilarnar.

Ein møguleiki er, at svínoyingarnir fáa boð um at koma til sýn við bilunum í Klaksvík, men tað er sera kostnaðarmikið at fáa bilarnar av oynni, tí Másin tekur ikki bilar. Einasti møguleiki er at leiga sandbátin, og hann kostar 15.000 krónur hvønn vegin.

- Tí er tað so gott, at teir koma til okkum at sýna bilarnar, tí annars hevði tað ikki latið seg kunnað gjørt.

Millum bilarnar, sum vórðu sýndir henda dagin var eisini brandbilurin á oynni. Tað er ein gamal bilur. Hann er frá 1968 og hann hevur koyrt 5.000 km. Eitt tekin um aldurin á bilinum er nummarspjaldrið. Á tí stóð Fø 2.770. Tað munnu ikki vera nógvir bilar, sum hava tílík nummarspjøldur longur. Brandbilurin í Svínoy var í góðum standi og sostatt kláraði hann sýnið hendan dagin.

# Hugnakvøld á Klaksvíkar Bókasavni

**Mánakvøldið klokkan 19, verður skipað fyri upplestri fyri vaksin og foreldur við børnum í Klaksvík. Næsta vika er Norðurlendsk Bókasavnsvika. Á øllum bókasøvnum í Norðurlondum, sum luttaka í felags bókasavnsvikuni verður skipað fyri einum tílíkum upplestrarkvøldi samstundis**

HUGNI OG MENTAN
*Rúna Sivertsen*

Á hugnaløtuni mánakvøldið, fer Bjørg Fjallsbak at lesa fyri børnunum úr bókini hjá Tove Janson um jólatræið hjá Mumifólkunum. Eftir søguna fara børnini at tekna tekningar av teimum í Mumidali.

Tina Purkhús fer at lesa søguna "De stumme gæster" hjá Williami Heinesen fyri teimum vaksnu. Síðani verur kaffi, saft og køkur at fáa.



*Hendan myndin er tikin á einari av hugnaløtunum, sum Klaksvíkar Bókasavn javnan skipar gjøgnum veturin, fyri børnum í barnagarðaldri og dagrøkt*

*Mynd: Hallgerð Færø*

Tað eru seks ár síðani byrjað var at hava eitt felags upplestrarkvøld í øllum Norðurlondum, og er hetta triðju ferð, at Klaksvíkar Bókasavn er við.

Ymiskt er, hvat hevur verið lisið hesi árini, men í ár hevur norðurlendski fyriskipanarbólkurin valt at leggja dent á, at Norðurlond hava orðið í samband við, at Norðurlandaráðið í ár hátíðarheldur 50 ára stovningardagin.

Fyriskipanarbólkurin hevur gjørt av, at tað verða William Heinesen og Tove Janson, sum skulu umboða tað Norðurlendska orðið.

Nevnast kann eisini, at tað á hvørjum ári verður gjørd ein plakat í samband við Bókasavnsvikuna. Í ár er tað Edward Fuglø, ið hevur teknað plakatina.



# Ógreiða um neyðarkall frá seksæringi av Argjum



*Tá ið seksæringurin á Argjum fór á land mánanáttina, vóru báðir menninir, sum við vóru, tíbetur bjargaði. Men sambært Dimmalætting, vórðu teir ikki tiknir fyri fult, tá ið teir bóðu um hjálp frá MRCC støðini. Men støðin sigur, at har hevur ongin ringt at biðja um hjálp*

**Í Dimmalætting í gjár varð sagt frá, at MRCC støðin tók ikki neyðarkallið fyri fult og tí varð ringt á politistøðina, sum setti bjargingartiltøk í verk. Hetta avsannar MRCC støðin púra avgjørt**

BJARGING
*Áki Bertholdsen*

– Vit taka altíð eitt neyðarkall fyri fult. Men í hesum føri fingu vit onki neyðarkall.

Djóni Weihe, leiðari á MRCC støðini er ógvuliga illa við av tíðindunum í Dimmalætting í gjár um hendingina, tá ið ein seksæringur av Argjum siglidi á land týsnáttina og tveir mans komu rættiliga illa fyri.

Dimmalætting skrivar, at ringt varð á MRCC eftir hjálp, men at støðin ikki tók teir neyðstøddu fyri fult!!!!

Tí løgdu teir neyðstøddu hornið á og ringdu ístaðin á politistøðina, sum setti tiltøk í verk at bjarga teimum báðum monnunum.

### Vóru ikki við

At eitt neyðarkall ikki verður tikið fyri fult er álvarsmál. Og leiðarin á MRCC støðini avsannar eisini púra avgjørdur, at hetta skal vera hent.

– Allar samrøður við okkum verða tiknar upp á band. Vit hava lurtað eftir bondunum og tey vísa, at vit als ongi telefonboð yvirhøvur hava fingið hesa náttina.

– Vit kunnu prógva, at ongin hevur ringt til okkara hesa náttina og at vit á ongan hátt vóru við í tiltakinum, tá ið hesir báðir menninir vórðu bjargaðir.

Djóni Weihe sigur, at tíðindi sum hesi koma ógvuliga illa við hjá stovninum, tí talan er um ein nýggjan stovn, sum hevur ein ógvuliga avgerðandi leiklut í vandastøðum og tí skal hann ikki koma tvørt fyri.

– Vit eru ein nýggjur stovnur og hava nakað at prógva, og tí koma tíðindi sum hesi ómetaliga illa við. Hann leggur afturat, at tað er nokk so logiskt, at menninir hava ikki ringt til MRCC, tí støðin hevur eitt heilt vanligt telefonnummar, 35 13 00, sum tey fægstu hava í høvdinum og sum enn færri munnu klára at minnast til í eini knappari vending í eini neyðstøðu.

### Alarmsentralurin

Tað vísir seg eisini nú, at tað er alarmsentralin, teir báðir menninir hava ringt til.

Á politistøðini verður váttað, at kl. 02.53 varð ringt til alarmsentralin og boðað frá, at ein bátur hevði siglt á land á Glyvursnesi.

– Alarmsentralurin setti síðani bjarging í verk við at ringja til Pressaran og sjúkrabilatænastuna.

Er tað rætt, at alarmsentralurin ikki trúði tí, tá ið boðað var frá, at báturin hevði siglt á land og at viðkomandi tí máttu ringja á politistøðina?

Vakthavandi politistur kundi ikki svara uppá í smálutir, hvat var farið fram. Men hann vísir á, at tað tað er vakthavandi á politistøðini, sum eisini tekur telefonina á alarmsentralinum.

Hevur telefonin fyrst ringt á alarmsentralin og síðani beint aftaná á politistøðina um sama mál, verður ikki skrásett báðu ferðina, tí tað er ongin orsøk at skriva tað sama niður tvær ferðir, sigur vakthavandi.

Maðurin, sum hevði vakt hesa náttina hevði frí, tá ið vit vóru í sambandi við politistøðina og teir neyðstøddu menninir vóru heldur ikki at hitta áðrenn blaðið fór til prentingar.

## Norðurlond hava orðið á Býarbókasavninum

Í Sambandi við at Norðurlandaráðið fyllir 50 ár, skipar Býarbókasavnið fyri barnatiltaki.

Tiltakið verður mánamorgunin klokkan 10.

Á tiltakinum fara tey at lesa søguna »jólatræið« úr Mumibókini »Tað ósjónliga barnið«, sum Tove Jansson hevur skrivað.

Hetta er ein søga, har tað hugtakandi verður sagt frá, hvussu mumihúskið fyrstu ferð heldur jól.

Tað er Alexander Kristiansen, sum hevur týtt søguna til føroyskt til tiltakið mánadagin.

Annars sigur Bókasavnið í tíðindaskrivi, at Edward Fuglø hevur teknað ársins plakat. Hann fekk barnabókavirðislønina hjá norðurlandaráðnum í fjør og plakatin í ár er tikin úr norrønu ævintýrheiminum við støði í føroyskum sagnum.

